**Sirið Stenberg**
**Bjørg Brynhildardóttir Egholm**
**Høgni Hoydal**
**Liljan Weihe**
**Hervør Pálsdóttir**
**Eirikur í Jákupsstovu**
**Sámal Petur í Grund**
**løgtingsfólk**

Løgtingið

**Uppskot til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um familjuískoyti**
(Hækking av orkuískoyti, inntøkumørkum og ognarmørkum)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 160 frá 24. desember 2015 um familjuískoyti, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 167 frá 20. desember 2017, løgtingslóg nr. 187 frá 21. desember 2018, løgtingslóg nr. 65 frá 9. mai 2019, løgtingslóg nr. 18 frá 10. mars 2020, § 10 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, løgtingslóg nr. 136 frá 25. oktober 2022, løgtingslóg nr. 42 frá 29. mars 2023 og løgtingslóg nr. 162 frá 20. desember 2023, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 2 e, stk. 1, verður "og 5.000 kr. í 2025 og 2026" broytt til: ", 5.000 kr. í 2025 og 12.000 kr. í 2026".

**2.** Í § 2 e, stk. 2, verður "300.000 kr." broytt til: "350.000 kr.".

**3.** § 8 a, stk. 4, verður orðað soleiðis: "*Stk. 4.* Umsókn um orkuískoyti skal vera Almannaverkinum í hendi í seinasta lagi 1. oktober 2026."

**4.** Í § 11 a, stk. 1, verður "50.000 kr." broytt til: "70.000 kr.".

**5.** Í § 11 a, stk. 2, verður "70.000 kr." broytt til: "90.000 kr.".

**6.** Í § 11 a, stk. 4, verður "50.000 kr." broytt til: "70.000 kr.".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Almennar viðmerkingar**

**Orsakir til uppskotið**
Oljuprísirnir eru higartil í ár hækkaðir munandi. Hetta rakar beinleiðis øll tey, sum brúka olju til upphiting, flutning og annað, og tað merkist hjá teimum flestu.

Hjá teimum við hægri inntøkum og betri fíggjarligum rásarúmi ber í stóran mun til at rinda tað, sum olja kostar eyka hetta tíðarskeiðið, samstundis sum hesi í nógvum førum hava møguleika til at leggja um til aðra orkuskipan bæði til húsarhald og bilar, har tað bæði er studningur frá landinum, og kostnaðurin fyri orkuna er minni.

Hjá teimum við lægri inntøkum og verri fíggjarligum rásarúmi rakar tað meint, tá orkuprísirnir fara upp, samstundis sum tey hava verri møguleika at leggja um til aðrar skipanir, um tey skuldu hildið tað verið skilagott.

Lagt verður upp til at veita ein beinleiðis fíggjarligan stuðul við inntøku- og ognarmørkum, sum ikki tekur útgangsstøði í sjálvari oljuni, soleiðis at hædd verður tikin fyri, at áfylling á húsini kann falla ymisk tíðarskeið, umframt at tað ikki er ein fyritreyt, at brennievnið til flutning er diesel ella bensin.

Tá talan er um eitt beinleiðis fíggjarligt ískoyti, so gevur tað frælsi til, at húskini sjálvi kunnu taka støðu til, hvat peningurin verður brúktur til. Um tey velja at brúka upphæddina til at rinda størru orkukostnaðirnar, um tey vilja brúka peningin sum part av útgjaldi fyri at skifta til aðra orkuveiting til upphiting ella flutning, ella um tey velja at brúka peningin á ein annan hátt, sum gagnar tí húskinum best.

Afturat hesum kemur, at beinleiðis mvg-stuðul til øll í nógvum førum hevur við sær, at prísirnir á vøruni sjálvari hækka, soleiðis at partur av stuðlinum ikki sæst aftur hjá brúkarunum. Hetta ger seg ikki á sama hátt galdandi, tá ein minni partur av brúkarunum fær atgongd til stuðulsskipanina.

Umframt hetta, so verður mett, at tá stuðul verður veittur eftir almannalóggávuni, so eru tað í størstan mun fólk, sum liva og virka í Føroyum, ið fáa ágóðan av stuðlinum. Afturat hesum kemur, at stuðulin ikki er treytaður av, hvussu støðan er ein ávísan part av árinum, men tekur hædd fyri, at orkuprísirnir longu hava verið høgir í eina tíð og eisini kunnu vera tað seinni í ár.

Lagt verður upp til, at stuðulin verður veittur eftir umsókn. Hetta hevur við sær, at stuðulin ikki av sær sjálvum verður útgoldin, men at húskini sjálvi kunnu gera sær tankar um, í hvønn mun stuðulin munar hjá teimum.

Tað hevur verið ført fram, at tað er truplari at gera málrættaðar skipanir enn generellar skipanir, og ofta er tað rætt. Støðan í hesum føri er tó, at ein leistur longu finst við orkuískoytinum, sum varð samtykt í 2023, og við at tillaga hesa skipanina ber til at gera batar, sum raka rættari sosialt, gera størri mun hjá einstøku húskjunum og hava munandi minni fíggjarligar avleiðingar fyri landið.

**Galdandi lóggáva**
Løgtingslógin um familjuískoyti fevnir í dag um tvær veitingar, familjuískoyti og orkuískoyti. Felags fyri hesar báðar veitingarnar er, at tær verða veittar familjum við lágum inntøkum, sum ikki hava ognir av týdningi.

Orkuískoyti varð sett inn í lógina við løgtingslóg nr. 162 frá 20. desember 2023.

Høvuðsendamálið við orkuískoytinum var upprunaliga at tryggja, at húski, sum hava lítla skattskylduga inntøku, ikki detta niðurímillum í samband við hækkandi orkugjøld. Endamálið var at veita húskjum við lágum inntøkum, sum ikki hava ognir av týdningi, ein fíggjarligan stuðul við eini árligari upphædd á 10.000 kr. í 2024 og 5.000 kr. í 2025 og 2026. Av tí, at ætlanin eisini var at eggja til eitt grønt umskifti, varð talan um eina skipan, sum var tíðaravmarkað til trý ár, tá møguleikin fyri at søkja um orkuískoyti var lagdur upp til at fella burtur. Orkuískoyti verður veitt eftir umsókn, og inntøkugrundarlagið liggur til grund fyri málsviðgerðini.

**Endamálið við uppskotinum**
Endamálið við hesum uppskotinum er at veita fíggjarliga sperdum húskjum, sum eru hart rakt av hækkandi orkuprísum í 2026, ein styrk fyri hetta árið, umframt at tillaga mørk í upprunaligu skipanini, so hon fylgir við teimum stóru inntøku- og prísbroytingum, sum hava verið, síðan skipanin upprunaliga varð gjørd.

**Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Uppskotið hevur við sær, at húski kunnu søkja um eitt orkuískoyti, sum hækkar úr 5.000 krónum til 12.000 kr., sum verður veitt í árinum 2026. Húski, ið hava inntøkugrundarlag upp til 350.000 kr. fáa rætt til orkuískoyti.

Treytirnar um ogn verða broyttar soleiðis, at mørkini fyri ogn hækka úr 50.000 kr. upp í 70.000 kr. hjá húskjum, sum telja eitt ella tvey vaksin, og úr 70.000 kr. til 90.000 kr. hjá húskjum, sum telja trý vaksin ella fleiri. Ogn verður framhaldandi mett at vera innistandandi í peningastovni og virðisbrøv, eins og undantak framvegis verður veitt fyri ogn, ið er endurgjald fyri varandi mein og ikki-fíggjarligan skaða.

Markið hjá persóni upp til 23 ár, sum sambært fólkayvirlitinum er skrásettur at búgva saman við einum ella báðum foreldrum, og ikki verður roknað sum ogn hjá húskinum, verður hækkað úr 50.000 kr. til 70.000 kr.

Av tí, at vanliga freistin fyri at søkja um orkuískoyti liggur stutt eftir, at hetta uppskotið kann verða sett í gildi, verður skotið upp, at freistin at søkja í 2026 verður flutt frá 30. juni til 1. oktober, tó at tað ber til at søkja gjøgnum alt tíðarskeiðið, og viðgerðartíðin vanliga er umleið 14 dagar.

Uppskotið hevur ikki verið til ummælis.

**Avleiðingarnar av uppskotinum**

**Fíggjarligar avleiðingar**
Uppskotið hevur í sær sjálvum við sær øktar útreiðslur í fíggjarárinum 2026. Tey somu, sum áður hava fingið orkuískoyti, umframt nøkur afturat, fara at fáa ágóða av hesum uppskotinum. Tað vóru gott 400 húski, sum fingu orkuískoyti í 2025. Leysliga mett vera 400 til 500 húski, ið fara at fáa rætt til hækkaða orkuískoytið, sum fer úr 5.000 til 12.000 krónur, og hetta hevur við sær øktar útreiðslur fyri landskassan upp á 3,8 mió. kr. í 2026.

Uppskotið verður fíggjað við eykajáttanarlóg. Uppskotssetararnir mæla til, at hetta uppskotið, sum hevur mettar útreiðslur á 3,8 mió. kr., kemur í staðin fyri uppskotið um generella mvg-frítøku av bensini og dieseli í eitt tíðarskeið, ið er mett at kosta 20 mió. kr. Hetta uppskotið verður tí ein bati hjá landskassanum á 16,2 milliónir samanborið við uppskotið, sum landsstýrið hevur borið Løgtinginum.

Uppskotið hevur ikki við sær fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur.

**Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Umsitingarligu avleiðingarnar eru avmarkaðar við tað, at skipanin er har frammanundan, tað bert eru nakrar upphæddir, sum verða tillagaðar og at tað sannlíkt verða nakað fleiri umsóknir.

Uppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

**Avleiðingar fyri vinnuna**
Eyka ískoytið verður  galdandi í árinum 2026 og kann tí ikki væntast at fáa varandi avleiðingar fyri vinnuna.

**Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum, tó at lutfalsliga fleiri húski við lægri inntøkum eru í syðra partinum av landinum.

**Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri tey húski, sum fáa rætt til orkuískoyti. Tað væntast at vera ymiskir samfelagsbólkar, sum fara at fáa ágóðan av broytingunum. Láginntøkubólkar eru serliga lesandi, fólka- og fyritíðarpensjonistar, stakir uppihaldarar, ið arbeiða niðursetta tíð o.o.

**Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**
Til nr. 1
Markið á 5.000 kr. verður hækkað upp í 12.000 kr. fyri 2026.

Til nr. 2
Markið fyri inntøkugrundarlagið fyri at fáa orkuískoyti verður hækkað úr 300.000 kr. til 350.000 kr.

Til nr. 3
Sambært lógaruppskotinum verður freistin at søkja Almannaverkið um orkuískoyti longd frá 30. juni 2026 til 1. oktober 2026.

Til nr. 4 og 5
Ognarmørkini í § 11 a, stk. 1 og 2 verða hækkaði úr ávikavist 50.000 kr. til 70.000 kr. og úr 70.000 kr. til 90.000 kr.

Til nr. 6
Ognarmarkið hjá persóni upp til 23 ár, sum sambært fólkayvirlitinum er skrásettur at búgva saman við einum ella báðum foreldrum, og sum ikki verður roknað sum ogn, verður hækkað úr 50.000 kr. til 70.000 kr.

**Til § 2**
Gildiskomuáseting.

**Á Løgtingi, 3. august 2026**

Sirið Stenberg

Bjørg Brynhildardóttir Egholm

Høgni Hoydal

Liljan Weihe

Hervør Pálsdóttir

Eirikur í Jákupsstovu

Sámal Petur í Grund